## Skógareldur í Kalifornia

Í Kalifornia viðganga myndugleikarnir, at teir hava mist tamarhaldið á einum stórum skógareldi, sum herjar við Mount Wilson nærhendis stórbýnum Los Angeles. Eldurin hóttir nú umleið 12.000 hús og 2.500 aðrar bygningar, og 10.000 fólk eru flutt burtur. Arnold Schwarzenegger, guvernørur, segði í gjár, at støðan er sera álvarssom, og at hann tí hevur lýst fleiri øki í undantaksstøðu. Hann bað fólk gera eftir boðunum, sum tey fáa frá myndugleikunum. Fleiri skógareldar hava verið nærhendis Los Angeles í seinastuni, men tann, sum nú herjar har, er tann ringasti, skrivar Reuters.



## Forseti fingið H1N1

Forsetin í Kolombia, Alvaro Uribe, hevur fingið ta nógv umrøddu krímsjúkuna Influensa A ella H1N1. Uribe hevur júst verið á einum suðuramerikonskum toppfundi í Argentina, og sambært einum talsmanni kendi hann seg illa, tá hann kom heimaftur. Seinni staðfesti læknin, at talan var um H1N1, men sjúkan forðar ikki forsetanum at røkja sítt arbeiði, skrivar AP. Talsmaðurin hjá stjórnini sigur, at stjórnin hevur kunnað hinar luttakararnar á toppfundinum um støðuna, men enn er einki frætt um, at nakar av hinum ríkisleiðarunum er vorðin sjúkur.

# Føroya Banki leitar víðari



*Janus Petersen, forstjóri í Føroya Banka, er nøgdur við boðið, hóast tað ikki var nokk til at keypa Fionia Bank. Nú verður leitað víðari eftir øðrum keypsmøguleikum í Danmark*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

**Tað eydnaðist ikki Føroya Banka at keypa danska Fionia Bank. Hetta steðgar tó ikki ætlanunum hjá Føroya Banka um at vaksa uttanlands**

FÍGGJARVINNA
*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*

Tað eydnaðist ikki Føroya Banka at koma inn á danska marknaðin á hesum sinni.

Bankin bjóðaði hósdagin, saman við Lån&Spar Bank, upp á at keypa Fionia Bank á Fjón. Tó var tað danski stórbankin Nordea, ið átti besta boðið, og slapp at keypa Fionia Bank, varð kunngjørt í morgun.

Hetta steðgar tó ikki ætlanunum hjá Føroya Banka um at sleppa inn á danska marknaðin.

- Vit hava havt eina sunna inntøku í nógv ár, og hava tí fíggjarligu styrkina til at útnytta verandi møguleikar í donsku bankavinnuni. Men vit hava tol til at bíða eftir rætta møguleikanum, sigur Janus Petersen, forstjóri í Føroya Banka, í viðmerking til danska blaðið RB Børsen, um at Nordea hevur trumfað boðið, sum Føroya Banki og Lån&Spar í felag góvu upp á Fionia Bank.

- Vit vilja framvegis leggja dent á at avgreiða privatar og smærri vinnukundar og leggja dent á ein lágan kredittvága, eins og í okkara heimamarknaði, sigur Janus Petersen um keypsdreymarnar hjá bankanum.

### Skattaundirskot gjørdi munin

Janus Petersen sigur við RB Børsen, at tað eftir hansara meting var eitt skattaundirskot upp á tvær milliardir, ið gjørdi útslagið fyri at tað er Nordea, ið sleppur at keypa Fionia Bank.

- Undirskotið svarar til eitt virði á 500 milliónir krónur. Sum ein minni banki við minni inntøku hevur tú ikki møguleika fyri at útnytta eitt so stórt undirskot, og tí høvdu vit ikki møguleika fyri at bjóða upp á tann partin, sigur Janus Petersen.

### Nøgd hóast alt

Spar Nord hevði eisini bjóðað upp á deildarnetið, meðan Nordea hevði bjóðað upp á alt samtakið og harvið eisini møguleikan fyri at útnytta skattligaundirskotið. Finansiel Stabilitet, ið er avhendingarfyritøkan hjá danska statinum, og sum stóð fyri søluni, vísir nevniliga á, at boði frá Nordea var upp á størsta partin av bankanum.

- Men tað er einki at gera við. Tú kann ikki bjóða upp á nakað, sum tú ikki kann brúka. Men vit eru nøgd við okkara boð, og vit eru sannførd um, at vit kunnu vera kappingarfør, um nakað annað verður sett til sølu, greiðir forstjórin í Føroya Banka frá, sum altso framvegis leitar við lykt eftir onkrum banka at keypa í Danmark.

Boðið upp á Fionia Bank varð givið í samstarvi við Lån&Spar Bank, og Janus Petersen avdúkar fyri RB Børsen, at eitt tílíkt samstarv als ikki er óhugsandi til framtíðar keypsætlanir.